# Lukkuliga listakvinnan við smákyktunum

**Løturnar við smákyktunum í sjóneykuni eru hennara lukkuligastu. – Tá kitlar tað í mær at lata listarliga hugflogið sleppa at flúgva har tað vil, sigur listakvinnan og einasti vísundateknari í Føroyum, Astrid Andreasen**

Eitt óumhugsað suff, – og evarska lítla kyktið undir sjóneykuni rýkur av hundanum til.

– Áh, nei, ikki aftur nú, mutlar Astrid Andreasen, vísundateknari, sum nú má byrja tekningina heilt av nýggjum.

– Tað eru slíkar løtur, eg ynski hesi smákyktini, har piparið grør, sigur hon, men tekur í sama andadrátti orðini í seg aftur.

– Nei, faktiskt eru hesu kyktini so fantastisk, at eg fái ikki eyguni av teimum. Hugsa tær: eitt tveir millimetur lítið kykt, við ørmum, klóm, eygum og øllum, og sum kann lukta seg fram til ein maka langt burturi. Man skuldi trúð, tað var lygn, sigur hon og sær veruliga ovfarin út.

Sermerkti eginleikin at undrast yvir alt lýsir av andlitinum hjá Astrid Andreasen og er týðiliga hennara størsta drívmegi bæði sum vísundateknari fyri Náttúrugripasavnið og sum listakvinna. Eitt næstan barnsligt forvitni, sum hevur ført listakvinnuna út á løgnastu røkur í skapandi heiminum.

## Einsamøll og lukkulig

Á eini av hesum rókunum situr Astrid Andreasen rættiliga einsamøll, sum einasti útbúni vísundateknari í Føroyum. Pinnastill situr hon har og hyggur niður í sjóneykuna, meðan blýanturin flytur seg millimetur fyri millimetur, og hon sjálv fer aftaná – inn í ein annan heim

– Tá eri eg næstan tað lukkuligasta, eg kann blíva. Tað er sum at meditera. Man tað vera soleiðis, tey religiøsu hava tað? Nei, sjálvandi ger tað meg eisini lukkuliga at vita, at børnini hava tað gott, men tað er nakað annað. Forrestin hevur tað neyvan verið serliga stuttligt hjá teimun at hava eina mammu, sum situr og gløðir niður í eina sjóneyku og mutlar: »Gud nái tey, um tey órógva nú«, sigur vísundaliga listakvinnan sjálvrannsakandi.

Spurd, hvar tað listarliga kemur inn í hesar tekningarnar av smákyktum og løgnum fiskum, sær Astrid Andreasen knappliga eitt sindur móð út.

– Ja, tað er hatta evindaliga kjakið um, hvar markið millum list og listahandverk gongur. Eg veit ikki. Men eg veit, at eg hevði ikki kunnað teknað hesar verurnar, um eg ikki eisini hevði eina listarliga útbúgving. Øll kunnu tekna umhvarvið av einum fiski. Spurningurin er, hvussu tú fært hann livandi. Har mást tú vita, hvat litir og rúmd kunnu gera, sigur Astrid Andreasen og avdúkar eitt loyndarmál.

– Eg orki ikki fyri at tekna skøtur. Ímynda tær – hon liggur bara har, ein hvít skøta, fløt sum eitt bretti og skal flytast yvir á eitt líka flatt og hvítt papír. Hvussu í verðini fært tú lív í eitt sovorðið? Einaferð var uppgávan enntá, at flata skøtan skuldi hava eitt glimt í eyganum, og tað fær hon also ikki bara við at flyta strikuna ein millimetur, vissar listakvinnan um.

## Tragikomiskt listastríð

Tað troyttar eftirhondini Astrid Andreasen at hoyra, at listahandverkarar bara endurtaka, meðan listafólk skapa veruliga list.

– Er tað ikki líka nógv endutøka, tá ein listamálari stendur og málar sama motiv umaftur og umaftur ár eftir ár? Eg royni, um ikki annað, allatíðina at finna uppá okkurt nýtt, leypa út, har eg ongantíð havi verið fyrr og síggja, hvat hendir. Vísundaligar tekningar av djórum seta sjálvandi mørk fyri, hvussu høgt tú kanst lata hugflogið flúgva. Men at sita við teimum ger meg forvitna, og fær tað at kribla í mær at sleppa forvitninum á flog sum listakvinna, sigur Astrid Andreasen.

Hon hevur tosað seg heita. Dylur ikki yvir, at stríðið millum føroysk listafólk eftir hennara tykki er vorðið tragikomiskt.

- Tað ringasta er kanska, at ung, eldhugað listafólk nú knappliga eisini mugu fyrihalda seg til, hvønn 'bólk' av listafólkum, tey halda seg hoyra til. Hetta stríðið drenar orku úr føroysku listini, meðan vit hava mest brúk fyri at stimbra hana. Og so fyllir klandrið eftirhondini so nógv í kjakinum um list, at tað er flovisligt. So nógv pláss hevur tað also ikki uppiborið, tí í síðsta enda er hetta eitt maktstríð, sigur Astrid Andreasen avgjørd.

## Íblástur krevur hart arbeiði

Og meðan hon letur hini um at klandrast, arbeiðir Astrid Andraesen hugagóð víðari við eini av sínum yndis rávørum - føroyskari ull, og øllum teimum søgunum, ullin fortelur um gerandisdagin og lívið hjá føroyskum kvinnum.

Eitt av kendastu verkunum hjá Astrid Andreasen er upphangið »Baby-boom«, ið er sett saman av nógvum, smáum, gjøgnummynstraðum troyggjum. Í einum øðrum verki síggja vit eina føroyska troyggju við einum langum hala av skóleistum hangandi niðurúr.

– Eg vil fegin fortelja søgur um, hvussu nógv arbeiði føroyskar kvinnur fyrr í tíðini løgdu í øll hesi bundu pløggini. Onkustaðni vita vit tað væl, men við at flyta pløggini inn í eitt annað høpi, síggja vit kanska virði í teimum av nýggjum og við øðrum eygum, sigur Astrid Andreasen.

Í løtuni liggur annars ein 365 metrar langt band, sum hon hevur bundið, á einum listasavni í Finlandi. Tá hon fekk stundir til tað, kundi Astrid Andreasen binda ein metur um dagin. Sostatt tók hetta verkið og arbeiðið eitt ár at gera.

– Kanska bandið kann vera eitt dømi um, at list eisini er hart arbeiði. Og tað er íblástur forrestin eisini. Um ung listafólk billa sær inn, at tey kunnu seta seg niður og bíða eftir, at íblásturin kemur dettandi av himli, so koma tey at bíða leingi. Íblástur kemur, meðan tú arbeiðir, so tað er bara um at bróta upp ermar og koma í gongd, sigur Astrid Andreasen avgjørd.

## Sangirnir hjá pápa

Ovurstóri fressurin, Aquarius, leypur brádliga upp í fangið á Astrid Andreasen, sum gevur honum ein muss.

– Er hann ikki flottur?, spyr hon og greiðir frá, at Aquarius er av heimsins størsta kettuslag og fer at viga umleið 10 kilo, tá hann er vaksin.

– Eg elski djór. Øll djór. Ongin djór eru ljót, og tey hava øll sína persónligheit – eisini flata skøtan, sum eg var eitt sindur órein við í áðni, sigur listakvinnan.

Fressurin leypir yvir á borðið, har ommudótturin hjá Astrid situr og leggur lit á tekningar, sum omman hevur teknað frammanundan.

– Hatta er farligt – at tekna fyri børnini, eg veit tað væl. Tey blíva alt ov sjálvkritisk, tí tey halda, at tínar tekningar altíð eru tær penastu. Í dag var eitt undantak, tí vit fingu gestir, ikki so, Anna Bjørk?, sigur Astrid Andreasen við ommudóttrina, sum situr púra burtur í tekningini.

Júst sum omman sat, tá hon var lítil og teknaði tekningar til sangirnar, sum pápin, Andreas Andreasen, týddi úr ymsum málum.

– Heima hjá okkum tókust øll við okkurt kreativt. Ikki minst mamma, sum altíð var á tremur av hugskotum og ótrúliga fitt í hondunum. Og so sjálvandi beiggi mín, Petur, sum í mínum eygum dugdi best at tekna í allari verðini. So tað lá líkasum í luftini, at eg sjálv eisini fór í gongd. Frá fyrstu løtu elskaði eg at tekna, og gavst ongantíð aftur, sigur 60 ára gamla listakvinnan, sum í løtuni hevur sína fyrstu støku framsýning í Føroyum, ið er at síggja í Snarskivuni.

*Mær dámar best at gera sovorðið, sum er vakurt, tí tað er so nógv ljótt til í verðini, sigur Astrid Andreasen, listakvinna og vísundateknari*

Tekstur: Anna V. Ellingsgaard
Mynd: Jens Kristian Vang